Størsti finningur nakrantíð:

# 20 kilo av hassji í eini tasku

**Mánamorgunin legði føroyska tollvaldið hald á ta størstu nøgdina av hassji, sum nakrantíð er funnin á einum ferðafólki. 20 kilo av hassji hevur eitt virði á umleið 2,5 milliónir krónur á gøtuni**



*Mánamorgunin fann Tollvaldið 20 kilo av hassji í taskuni hjá einum donskum ferðamanni, sum kom til Føroyar við Norrønu*

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Tá tollararnir tíðliga mánamorgunin stóðu klárir at taka ímóti ferðafólki, sum kom við Norrønu úr Hanstholm, løgdu teir serliga merki til ein mann, sum hevði heldur løgnan atburð.

Talan var um ein 28 ára gamlan dana, sum hevði ikki minni enn 20 kilo av hassji í einari tasku, ið hann hevði um herðarnar.

Tá smuglarin sá hundin hjá tollvaldinum, gjørdist hann bangin og rastleysur. Hetta bitu tollararnir merki í og fóru at kanna hann nærri. Tá gjørdi hundurin vart við, at okkurt illgrunavert var í taskuni hjá manninum. Hetta upplýsir Kjartan Dam Joensen, yvirtollari í Tollbúðini í Havn.

Tá tollararnir lótu taskuna upp, fingu teir ein rættiligan skelk. Taskan var nevniliga kjokkfull av hassji til tann føroyska marknaðin.

Maðurin hevði ferðaseðil til Tórshavn og ætlaði sær í land her at avhenda hassjið til onkran her.

Tann ovurstóra nøgdin av hassji, sum maðurin hevði á sær, hevur eitt virði uppá umleið 2,5 milliónir krónur, so talan er eisini um stórar upphæddir í krónum og oyrum.

## Spreingir hagtølini

Hesin fongurin fer avgjørt at síggjast aftur í hagtølunum hjá tollvaldinum. Vanliga leggur tað hald á millum 4 og 6 kilo av hassji um árið. Nú hevur tollvaldið brádliga funnið 20 kilo í einum.

Maðurin situr í løtuni í varðhaldinum í Havn, og løgreglan kannar málið nærri. Meðan kanningarnar fara fram, vil politiið ikki geva nærri upplýsingar um málið.

Størstan nøgdin av hassji, ið tollvaldið í Føroyum nakrantíð hevur lagt hald á, er 34 kilo, sum vórðu funnin umborð á einum grønlendskum trolara, ið lá við bryggju her fyri umleið fimm árum síðani. Ætlanin var tó at flyta hetta hassjið til Grønlands, og tað var ikki ætlað til tann føroyska marknaðin.







# Bilar

Nr. 118 • hósdagur • 26. juni 2003 • 75. árg.

HONDA

### Honda Accord 2.0 Comfort sedan

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,0 litur 4 syl. bensin 155 hk |
| 0-100 km/t | 9,2 sek |
| Bensinnýtsla | 13,0 km/t |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| *Stødd og vekt* | |
| Longd | 467,0 cm |
| Breidd | 176,0 cm |
| Hædd | 145,0 cm |
| Eginvekt | 1.300 kg |
| Totalvekt | 1.925 kg |
| Viðførisrúm | 459 litrar |
| Prísur: | kr. 288.950,- |
| *Søluumboð:* | Norðbil v/Oyggjarvegin FO-100 Tórshavn Tel. 313707 • Tel. 313535 www.nordbil.fo FO-100 Tórshavn |

# Nýggjur smartur Honda Accord

## – sum sedan og stationcar

**Á bilasøluni Norðbil við Oyggjarvegin hava teir fingið tveir nýggjur Honda Accord, talan er um Accord sedan og Accord Tourer, ið er stationcar útgávan. Báðir verða gjørdir við 2.0 og 2.4 litur bensinmotorum.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Birgir og Frits Dam Jacobsen frá Norðbil við nýggju Honda Accord-unum, sum nú skulu kappast í størra miðal-klassanum*
*Mynd: Jens K. Vang*

Honda Accord er vorðin ein størri og dýrari bilur, sum nú kappast við bilar í dýrara miðalklassanu, hesin er ein størri og rúmligari bilur enn forgangarin. Accord hevur smart design, modellið er ein blandingur av Mazda 6 og Alfa Romeo 156. Síðublunkljósini eru í síðuspeglunum, sum vit kenna tað frá t.d. Mercedes. Í fyrstu syftu vera tveir bensinmotorar á skránni, ein 2.0 litur við 155 hk og ein 2.4 litur við 190 hk. Næsta ár kemur ein útgáva við 2.2 litur dieselmotori. Accord verða gjørdir sum sedan og sum stationcar, tá eitur hann Accord Tourer. Viðførisrúmið á sedan er 459 litrar og 576 litrar á Tourer. Tourer er 8,5 cm longri enn sedan, eisini er aksilfrástøðan longri og harvið betur pláss til tey ferðandi á baksetrinum. Bilurin er rúmligur og góður at sita í, bæði sum bilførari og sum ferðandi. Dioduljósini í instrumentborðinum gera, at t.d. speedometrið er sera lætt at avlesa.

### Comfort, Sport og Executive

Koyrieginleikarnir eru góðir, tað merkist, at bilurin hevur eitt heilt nýtt upphang aftan. Accord hevur nú seks airbag íroknað airbaggardinur, sum eru standard. Bilurin fæst í útgávunum Comfort, Sport og Executive. Í Executive útgávuni hevur hann VSA (Vehicle Stability Asist) skipan, sum ger at bilurin ikki glíður út í svingum. Aircondition anlegg við klima kontroll (dual-zone) er standard í øllum modellunum. Honda Accord hava í nøkur ár verið gjørdir í Onglandi, men nú verða teir aftur gjørdir í Japan. Accord í Evropa og USA eru ikki eins, hesir eru tilpassaðir amerikanska marknaðin, og modellið er heldur ikki eins. Nýggi Honda Accord er ein væl koyrandi luksusbilur, sum heilt víst kemur at gera seg galdandi í dýrara miðal-klassanum...



*Honda Accord innan*
*Mynd: Jens K. Vang*



*Honda Accord Tourer er 8,5 cm longri enn sedan*
*Mynd: Jens K. Vang*